Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 30.01.2025 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fuglø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Rebekka Jensen<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Uni Rasmussen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 1/25 | 24/00546-7 | Umbøn um tilsøgn - broyta býarplan og byggisamtykt - matr. nr. 138a SG | 3 |
| 2/25 | 24/00610-2 | Ummæli um marknaðarumskipan - at leggja part av matr. nr. 12a aftrat matr. nr. 5 við Gøtugjógv | 4 |
| 3/25 | 24/00639-8 | Umsókn um byggiloyvi til nýbygging av sethús, altan/útigólv, Hækkan av húsum, matr. nr. 95n, Norðragøta | 6 |
| 4/25 | 24/00697-4 | Serstøk byggisamtyktini fyri matr. nr. 339m og 339aq í Fløtugerði - Leirvík | 8 |
| 5/25 | 25/00035-2 | Broyta býarplan matr. nr. 339ar og 339a í Fløtugerði í Leirvík | 10 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6/25 | 25/00024-2 | Umsókn um stuðul, Blásastova. Frágreiðing og tilmæli | 11 |
| 7/25 | 25/00047-1 | Ferðavinnuverkætlan 2025 | 12 |
| 8/25 | 25/00058-1 | Fundardagar fyri 2025 | 14 |
| 9/25 | 25/00057-1 | Kommunustýrisskipan - broyting 2025 | 15 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 1/25 Umbøn um tilsøgn - broyta býarplan og byggisamtykt - matr. nr. 138a SG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.01.2025 | 1/25 | 24/00546-7 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 1/25 | 24/00546-7 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn, um at broyta býarplanin fyri matr. nr. 138a í Syðrugøtu, umframt verður heitt á Eysturkommunu, um at broyta ein part av matr. nr. 231, so til ber at gera veg á matr. nr. 138a og 231.<br><br>Øki liggur í J, Landbúnaðarøki og ætlanin er at broyta hetta til at B1, Alternativ íbúðarbygging.<br><br>Sí skjøl í málinum.<br><br>Í sama umráði liggur matr. nr. 343, sum partvís liggur sum eitt J, Landbúnaðarøki og B, Bústaðarendamál, mælt verður til at hesin matrikulin verður allur eitt B, Bústaðarøki. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at broyta býarplanin fyri matr. nr. 138a og part av matr. nr. 231 sum omanfyri nevnt, harumframt at broyta tann partin av matr. nr. 343 sum liggur sum J, Landbúnaðarøki til eitt B, bústaðarøki. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. januar 2025**
Byggi- og Býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. januar 2025**
Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndini til viðgerðar

## 2/25 Ummæli um marknaðarumskipan - at leggja part av matr. nr. 12a aftrat matr. nr. 5 við Gøtugjógv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.10.2024 | 42/24 | 24/00610-2 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 58/24 | 24/00610-2 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.01.2025 | 2/25 | 24/00610-2 |
| 4 Býráðið | 30.01.2025 | 2/25 | 24/00610-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 10. oktober 2024 frá Búnaðarstovuni, har heitt verður á kommununa, um at ummæla eitt keyp av uppískoytisstykki av festinum matr. nr. 12a at leggja aftrat matr. nr. 5 við Gøtugjógv.<br><br>Sí skjøl í málinum.<br><br>**Ískoyti 22.01.2025**<br>Umsitingin hevur havt ummæli frá Búnaðarstovuni til hoyringar hjá eigarinum av matr. nr. 9, 29 og 30a við Gøtugjógv. Freistin at svara hoyringini var 12. des. 2024. Eysturkommuna hevur ikki móttikið nakrar viðmerkingar ella klagur. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at samtykkja ummæli til Búnaðarstovuna.<br><br>**Ískoyti 22.01.2025**<br>Umsitingin mælir til, at samtykkja ummæli til Búnaðarstovuna. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. oktober 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum við tí viðmerking, at vegurin verður tikin úr og latin Eysturkommunu.

**Býráðið 31. oktober 2024**
Málið tikið av skrá.

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 23. januar 2025</u>**
Byggi- og býarskipanarnevndini tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 30. januar 2025</u>**
Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndini til viðgerðar

## 3/25 Umsókn um byggiloyvi til nýbygging av sethús, altan/útigólv, Hækkan av húsum, matr. nr. 95n, Norðragøta

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.01.2025 | 3/25 | 24/00639-8 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 3/25 | 24/00639-8 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um byggiloyvi til umbygging/nýbygging av verandi sethúsum á matr. nr. 95n í Norðragøtu.

Talan er um eini eldri sethús sum skulu umbyggjast, og í hesum økinum er tað merkt at tættari bygging.

**Frávik í málinum:**

- Mest loyvda hædd upp til yvirgrind er 5m sambært byggisamtyktini fyri øki, og umsøkjarin ynskir at hækka yvirgrindina 25 cm.
- Sethúsini halda ikki fráleikan til granna á matr. 94c. Fráleikin millum húsini er 4,49 cm.

Um umsøkjarin skal fáa loyvi at halda fram er neyðugt at býráði játtar teimum frávik frá hæddarviðurskiftum og fráleikan til mark.

Tekniska umsiting hevur hoyrt grannar á matr. nr. 95m og 94c.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at geva loyvið til frávik til fráleikan og hæddini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. januar 2025**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur

Uni Rasmussen og Heri Mikálsson taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

Ann Fuglø tekur ikki undir við tilmælinum, vegna brunaspjaðing til granna.

**Býráðið 30. januar 2025**

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í byggi- og býarskipanarnevndini við tí viðmerking at grannar omanfyri verða hoyrdir.

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Hanna Jensen, Heri Mikálsson, Pól í Skorini, Rebekka Jensen, Unn Jarnskor Ellingsgaard, Uni Rasmussen

**Atkvøðr ímóti:**
Ann Fuglø, við tí viðmerking at tað er vandandi brunatrygd

Magnus Skoralíð var úti undir viðgerðini vegna ógegni.

## 4/25 Serstøk byggisamtyktini fyri matr. nr. 339m og 339aq í Fløtugerði - Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 12.12.2024 | 51/24 | 24/00697-4 |
| 2 Býráðið | 19.12.2024 | 76/24 | 24/00697-4 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.01.2025 | 4/25 | 24/00697-4 |
| 4 Býráðið | 30.01.2025 | 4/25 | 24/00697-4 |

**Málslýsing:**

Serstøk byggisamtykt er gjørd fyri matr. nr. 339m og 339aq í Fløtugerði í Leirvík.

Grundøkini liggja í einum B2 økið ið er eitt bústaðarøki við serstakara byggisamtykt.

Hesir matriklar skulu broytast frá at verða eitt “B2 økið við serstakari byggisamtykt” til at verða eitt “B1 øki Alternativ íbúðarbygging”.

Sí skjøl í málinum.

**Ískoyti 22.01.2025**
Serstøk byggisamtykt er gjørd fyri matr. nr. 339m og 339aq í Fløtugerði í Leirvík.

Tað er ikki neyðugt at broyta øki frá B2 økið ið er eitt bústaðarøki við serstakara byggisamtykt til eitt B1 øki Alternativ íbúðarbygging.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingini.

**Ískoyti 22.01.2025**
Umsitingin mælir til, at varðveita øki sum eitt B2, bústaðarøki við serstakari byggisamtykt.

### Byggi - og býarskipanarnevnd 12. december 2024
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 19. desember 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. januar 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. januar 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevdini.

## 5/25 Broyta býarplan matr. nr. 339ar og 339a í Fløtugerði í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.01.2025 | 5/25 | 25/00035-2 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 5/25 | 25/00035-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur undirskriva sáttmála við Almanna- og mentamálaráðið um øki í Fløtugerði í Leirvík, øki er umleið 4000 fermetrar, og ætlanin er at byggja ein bústovn á økinum.<br><br>Øki liggur í einum B2, Bústaðarøki við serstakari byggisamtykt, og gevur tað ikki loyvi at byggja bústovnar,  tí er neyðugt at broyta byggisamtyktina til E, Almenn endamál og stovnar.<br><br>Sí viðfesta kortskjal. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at taka undir við broytingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. januar 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. januar 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 6/25 Umsókn um stuðul, Blásastova. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.01.2025 | 1/25 | 25/00024-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 27.01.2025 | 1/25 | 25/00024-2 |
| 3 Býráðið | 30.01.2025 | 6/25 | 25/00024-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsókn um árligan stuðul til Gøtu Fornminnissavn móttikin. Grundgevingin fyri at biðja um stuðul so tíðliga er, at tey partvíst almennu vesini, ið Gøtu fornminnissavn byggir, og umleggingin av hita í Ísakshúsi, hevur kostað nógv, møguliga meira enn ætla, og felagnum tørvar nú pengar.<br><br>Á fíggjarætlanini eru 200.000 kr. settar av til hetta. (Hetta er ein stuðulshækkan uppá 50.000 kr.) |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á rakstrarkonto 52852, Blásastova, eru 200.000 kr. settar av til endamálið. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsókninni á møti. |

**Mentanarnevndin 20. januar 2025**
Mentanarnevndin mælir til at ganga umsókninni á møti.

**Fíggjarnevnd 27. januar 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 30. januar 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hja mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 7/25 Ferðavinnuverkætlan 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.01.2025 | 2/25 | 25/00047-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 27.01.2025 | 2/25 | 25/00047-1 |
| 3 Býráðið | 30.01.2025 | 7/25 | 25/00047-1 |

**Málslýsing:**

Við hesi verkætlan byrjar Eysturkommuna menningina av burðardyggari ferðavinnu, sum fer at geva lokalsamfelagnum fleiri arbeiðspláss, økta inntøku og størri vælveru í økinum. Verkætlanin hevur m.a. sum endamál at gera bygdirnar meira tillokkandi sum stað at búgva í, at ferðavinnuaktørar í økinum, sum bert arbeiða lítið ella sera lítið við ferðavinnu sum nú er, verða hjálptir at hækka um góðsku og inntøku sína  og at 2-3 nýggjar fyritøkur, ið partvíst ella fult arbeiða við ferðavinnu í kommununi, verða stovnaðar

Í løtuni hevur Eysturkommuna nakað av ferðavinnu at byggja á, men her eru stórir menningarmøguleikar.
Ein miðdepil verður mentur at tæna sum drívkraft í staðbundnum handilssamstarvi.

Ynskið er at samskipa ta ferðavinnuna, ið longu er, enn betur soleiðis, at tað 1) er tyðiligari hjá ferðafólkunum, hvar ein skal fara fyri at keypa ein heildarpakka, og at tað 2) verður lættari hjá teimum vinnurekandi í kommununi at sejla sítt produkt og at 3) samstarvið millum aktørarnar verður enn betur.

Í verkætlanini er samstarvsparturin eitt bygdasamfelag í Norra við umleið 1000 íbúgvarum og NORA (Norðurlendskt Atlantssamstarv) hevur per 1. januar 2025 stuðla verkætlanini við 200.000 kr.
Eginpeningurin, ið Eysturkommuna má leggja í verkætlanina, er 120.000 kr.
Verkætlanin er projekterað at líða yvir trý ár, tó er fokus í hesi umsókn bert uppá hetta fyrsta árið, 2025.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Verkætlanin kostar 120.000 kr. Eingin peningur er settur av til endamálið.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at ganga umsóknini á møti

**Mentanarnevndin 20. januar 2025**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum. Peningurin skal finnast á konto, sum hóskar til endamálið.

**Fíggjarnevnd 27. januar 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á 60.000,00 kr. til verkætlanina, og restin verður tikin av verandi játtan á konto 717 (vinnupolitikkur)

**Býráðið 30. januar 2025**
Einmælt samtykt at taka undr við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 8/25 Fundardagar fyri 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.01.2025 | 8/25 | 25/00058-1 |

| Málslýsing: |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi uppskot til fundardagar fyri 2025 |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| |

| Tilmæli |
|---|
| |

**Býráðið 30. januar 2025**
Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi uppskoti til fundardagar.

## 9/25 Kommunustýrisskipan - broyting 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.01.2025 | 9/25 | 25/00057-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi uppskot til kommunustýrisskipan fyri Eysturkommunu |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Býráðið 30. januar 2025**
Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum til komandi býráðsfund tá 2. viðgerð verður.

fundurin lokin kl. 18.30

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Pól í Skorini

Rebekka Jensen

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Uni Rasmussen